## Søtur musikkur…

**Duldi skattalættin hjá Sambandsflokkinum og uppskot frá fakfelagsleiðara um trípartssamráðingar á arbeiðsmarknaðinum eru søtur musikkur í fólkafloksoyrum**

LØGTINGSVAL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Fullveldi varð ikki tikið á tungu á tíðindafundinum hjá Fólkaflokkinum hósmorgunin. Tað tykist, sum sjógvur er lagdur millum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin, og Anfinn Kallsberg nýtti nógv orð at greiða frá trupula fýradimensiónella politiska spektrinum í Føroyum við høgra/vinstrapolitikki og loysing/-sambandspolitikki.

– Tað sigur seg sjálvt, at tað er trupult hjá borgarliga Fólkaflokkinum at arbeiða saman við sosialistiska Tjóðveldisflokkinum, sum á norðulendskum plani samstarvar við uttasta vinstra, segði Anfinn Kallsberg.

Fólkafloksformaðurin fegnaðist um, at Sambandsflokkurin nú tekur undir við Fólkaflokkinum at lækka skattin.

– Bert spell, at Sambandsflokkurin ikki vil siga, hvussu hetta skal gerast, tí tað kundu vit hugsað okkum at vitað. Hetta er søtur musikkur í okkara oyrum, segði Anfinn Kallsberg.

Tað var týðuligt, at Fólkaflokkurin eisin er fegin um útsagnirnar hjá formanninum í Havnar Arbeiðsmannafelag, sum hevur tosað um trípartssamráðingar á arbeiðsmarknaðinum, har onnur viðurskifti, so sum skattalætti, verða tikin við í lønarsamráðingarnar. Tað var eisini søtur musikkur, segði Anfinn Kallsberg.

# Niður við skattinum




*– Vit eru einasti garanturin fyri skattalætta. Vit hava lækkað skattin 300 milliónir – uttan okkum, so var eingin skattalætti, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður og formaður Fólkafloksins*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Vit skulu gjalda minni í skatti, tí so tíma vit betur at arbeiða, vit tjena meira, og landskassin fær eisini meir í sín part – og tí betur ráð til skattalætta. Flokkurin hevur lagt fram valskrá í sjey punktum**

LØGTINGSVAL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Yvirtøkulógin skal samtykkjast
- Skatturin skal niður, serliga á seinastu tjentu krónu
- Eitt sterkt vinnulív og sjalvberandi búskap
- Einskilja almennar fyritøkur at gjalda skuld niður
- Leggja tænastu nærri borgaranum og tillaga almennu umsitingina
- Lógarfesta øllum føroyingum eftirlønartrygging
- Yvirtaka útlendingamál at fyribyrgja trupulleikum

Hesi eru tey sjey boðini í valskránni hjá Fólkaflokkinum til løgtingsvalið 20. januar.

Yvirtøkulógin, ella Tvøroyrarskjalið, sum hon eisini verður nevnd, er komin undir land, sigur Anfinn Kallsberg, formaður Fólkafloksins.

– Hon er klár til politiska viðgerð. Við henni fáa vit sjálvi rættin at yvirtaka, tá tað passar okkum – øll mál, uttan tey, ið eru tengt at suverenitetinum, so sum uttanríkismál. Áðrenn hesi mál kunnu yvirtakast, skulu tey til fólksins dóm við eini fólkaatkvøðu.

Fólkaflokkurin vil kortini hava størri ávirkan á uttanríkispolitikkin, og hann vil yvirtaka útlendingamál beinanvegin.

– Hetta til tess at fyribyrgja trupulleikum, sum onnur lond hava havt av hesum málum í ólukkumát, sigur Anfinn Kallsberg.

Hann nevnir t. d. at vit bert skulu geva fólki arbeiðs- og uppihaldsloyvi, ið vit hava brúk fyri. Hann tók dømi um sveisarar á Tórshavnar Skipasmiðju, læknar, ítróttarfólk og nú eisini fólk at arbeiða í fiskiídnaðinum á landi.

Fólkaflokkurin ynskir eisini, at vit skulu hava ein sjálvberandi búskap – við herrópinum, at »vit skulu gjalda har vit valda«.

Fólkaflokkurin vil styrkja og skapa tryggar karmar fyri familjuna, flokkurin byggir á kristna siðaarvin, og hann heldur, at tann einstaki skal hava rásarúm til sjálvur at leggja sær lívið til rættis eftir evnum og dugnaskapi.

### Garanturin fyri skattalætta

Fólkaflokkurin er garanturin fyri skattalætta – einasti garanturin. Tað sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður, og vísir á, at flokkurin hevur lækkað skattin 300 mió seinastu árini, og at tað ikki var framt, var tað ikki vegna Fólkaflokkin.

Av teimum seinastu 30 árunum hevur Fólkaflokkurin sitið í landsins stjórn í tey 22 – ofta við fíggjarmálaráðharra, og í sløk átta ár við løgmanni.

Fólkaflokkurin hevur á nýggjárinum fingið marginalskattin niður frá 57% til 56% – nú er málið hjá Fólkaflokkinum at fáa allan skattin niður – men serliga á seinast tjentu krónu.

– Tí tað skal loysa seg at arbeiða, sigur Anfinn Kallsberg. Vit trúgva uppá, at um meira er eftir av seianst tjentu krónuni, so fara fólk at arbeiða nógv meira, tjena nógv meira og soleiðis verður nógv meira eftir til almennu kassarnar, sum so hava ráð at geva fólki skattalætta, sigur Anfinn Kallsberg.

### Hjálp til teirra ið tørva

Forðingar skulu burtur, soleiðis at øll við førleika hava møguleika at klára seg sjálv.

– Og harvið hava veit møguleika veruliga at hjálpa teimum, ið treingja – tí bara tey, sum hava brúk fyri hjálp, skulu fáa – so hava vit ráð at hjálpa teimum, sum veruliga tørva, sigur Anfinn Kallsberg.

Fólkaflokkurin sigur, at eitt sterkt vinnulív er hornasteinurin í einum góðum samfelag.

### Selja fyri skuld

Flokkurin vil einskilja almennar fyritøkur at gjalda skuld niður. Hann vil eisini endurskoða karmar fyri alivinnuna og rækjuflotan, og skipa karmar at loysa ósemjur á arbeiðsmarknaðinum.

Fáa vit ikki eina smidligari skipan á hesm øki, er so skjótt at bróta niður kappingarføri og marknaðaratgongd, heldur Fólkaflokkurin.

Almanna- og heilsuverkið skal kjølfestast við støði í einum burðardyggum búskapi. Tænastustigið skal betrast og tænastur skulu leggjast nærri borgarum.

Alemnna umsitingin skal tillagast – gerast smidligari og brúkaravinarligari.

Barsilsskipanin skal í samráð við arbeiðsmarknaðin leggjast út til partarnar sjálvar, og eftirlønartrygging skal logarfestast øllum føroyingum.

Fólkaflokkurin heldur, at vit skulu hava eftirlønarskipanir, sum byggja á arbeiðslívi hjá hinum einstaka – fólk skulu sjálvi spara upp. Síðani skal vera ein almenn skipan til tey, ið ikki hava hendan møguleika.

# Almenn umsiting ov stór

**Økta virksemið, eitt nú opinleikin í fyrisitingin, krevur eina stóra almenna fyrisiting. Men kortini er hon ov stór, heldur Fólkaflokkurin**

LØGTINGSVAL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað var gamalt, at Fólkaflokkurin helt, at almenna umsitingin er alt ov stór. Tað heldur flokkurin enn. Men eftir at hava sitið í landsins leiðslu í nógv ár, ásannar Anfinn Kallsberg, at tað er ikki bara sum at siga tað at minka almennu umsitingina.

– Vit mugu hava í huga, at nógvar uppgávur eru lagdar á umsitingina. Vit hava fingið lógina um alment innlit, um løgtingsins umboðsmann og aðrar við, sum krevja nógv av umsitingini. Hetta snýr seg um opinleikan, sum vit skulu hava, men tað kostar, ásannar Anfinn Kallsberg.

Men umsitingin skal altso minkast kortini. Falna samgongan tók eina millión frá hvørjum stýri við næstseianstu fíggjarlóg, og hesaferð hevur einki stýri fingið hægri játtan, enntá okkurt fingið lægri játtan, sigur Anfinn Kallsberg.

Men hann spældi eisini bóltin til lóggevararnar – til løgtingsmenn. Hann tók eitt dømi:

– Løgtingið samtykti, at allir bátar undir 15 tons bert fáa fiskiloyvi eitt hálvt ár í senn. Hetta merkir, at allir teir 1.400 bátarnar skulu søkja um fiskiloyvi tvær ferðir umárið – ella 2.800 umsóknir um árið, sum skulu viðgerast. Hetta krevur nógva arbeiðsorku í Fiskimálaráðnum. Um arbeitt verður á henda hátt, so ber ikki til at minka almennu umsitingina, segði løgmaður.

Hann vildu tó ikki vera við, at tað var samgongan, sum arbeiddi soleiðis í tinginum – bert partar av samgonguni.

Men Fólkaflokkurin hevur havt konkretar ætlanir við at miðspjaða almennu umsitingin fyri at lætta um og gera hana bæði smidligari og bíligari. Til hetta kravdist P/F Postverkið – at postverkið gjørdist eitt alment partafelag.

Vinnumálaráðið hevur arbeitt við at skipa snarskivur á øllum posthúsum soleiðis, at 80% av øllum almennum ørindum hjá borgarum kundu avgreiðast har. Hetta datt eisini niðurfyri, nú valið varð skrivað út, men verður tikið framaftur.






*Anfinn Kallsberg heldur, at nýggja vinnupolitiska kósin hjá Tjóðveldisflokkinum er í so frelst, sum hann málber. Fólkaflokkurin heldur tað er rætt at veita rækjuvinnuni og alivinnuni eina hjálpandi hond*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Tað sum ikki kann standa nýtist ikki at falla

**Fólkaflokkurin er ikki samdur við vinnupolitikkinum hjá Tjóðveldisflokkinum. Flokkurin heldur ikki, at alt tað, sum ikki megnar standa, skal treytaleyst falla. Fólkaflokkurin vil veita kreppuraktu rækju- og alivinnuni eina hjálpandi hond**

LØGTINGSVAL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Fólkaflokkurin heldur lítið um kúvendingina hjá Tjóðveldisflokkinum á vinnupolitiska økinum. Søguliga hevur Tjóðveldisflokkurin altíð ligið á vinstra vonginum, men Tjóðveldisflokkurin hevur kúvent á vinnuøkinum. Flokkurin vil hava eitt frælst vinnulív, har politiska stýringin av vinnulívinum skal steðga.

Hugsjónarliga átti nýggi vinnupolitikkur Tjóðveldisfloksins at hóska væl til borgarliga búskaparpolitikkin hjá Fólkaflokkinum. Men so er ikki. Fólkaflokkurin heldur, at nýggi vinnupolitikkurin hjá Tjóðveldisflokkinum er veruleikafjarður.

Fólkaflokkurin heldur at tað er í tøkum tíma at endurskoða karmarnar fyri bæði rækju- og alivinnuna, sum hesar vinnur framhaldandi verður partur av føroyska búskapinum.

### Frelst tjóðveldi

Formaður Fólkafloksins, Anfinn Kallsberg, heldur, at nýggi vinnupolitikkurin hjá Tjóðveldisflokkinum ber brá av at vera í so frelstur, sum hann málber seg. Fólkaflokkurin vil ikki útihýsa at geva kreppuraktum vinnum eina hjálpandi hond, tá á stendur.

– Beinleiðis stuðul til vinnulívið kemur ikki upp á tal, men vit ætla okkum at endurskoða karmarnar fyri bæði rækju- og alivinnuna. Vilja vit framhaldandi varðveita rækjuskipini og framhaldandi vera í kappingini við hini londini, so er neyðugt at endurskoða karmarnir, sum hesar vinnur virka undir, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgmaður heldur, at tað er ómetaliga týdningarmikið, at søguligu veiðurættindini hjá rækjuvinnuni ikki gleppa føroyingum av hondum. Fyri at tryggja tað ikki hendur, vil Fólkaflokkurin virka fyri, at rækjuvinnan fær eina serliga skipan, so vinnan megnar at hóra undan.

Anfinn Kallsberg nevndi DIS og FAS skipanirnar sum møguligar skipanir fyri rækjuvinnuna. Undir DIS og FAS skipanini eru hýrurnar skattafríar, men lønin er tá samsvarandi minni, um skattur hevði verið á lønini.

Fólkaflokkurin vil ikki læsa seg fastan til eina ávísa skipan, men er opin fyri teimum møguleikum, sum eru fyri at hjálpa rækjuvinnuni.

Spurdur um Fólkaflokkurin ikki var ov seinur á sjóarfallinum at veita rækjuvinnuni stuðul, tá eitt nú Hvilvtenni longu er farin av landinum, svaraði Anfinn Kallsberg fyri, at undanfarna samgongu hevði fingið hópin av uppskotum um at hjálpa rækjuvinnuni, men alt varð feiðað av borðinum.

Hann segði, at Fólkaflokkurin fór at gera tað hann var mentur fyri, at fáa vinnuna á føtur aftur. Umboð fyri flokkin løgdu kortini enn einaferð dent á, at talan varð undir ongum umstøðum at veita rakstar stuðul.

### Fegnast

Ikki heilt óvæntað er herrópið, skattin niður, í valskráini hjá Fólkaflokkinum. Fólkaflokkurin lovar í komandi valskeiði at virka fyri, at skatturin á teimum seinast vunnu krónunum lækkar. Fólkaflokkurin fegnast um, at Sambandsflokkurin eisini hevur ítøkiligar ætlanir um at lækka sonevnda marginal skattin.

– Tað passar okkum sjálvsagt væl, at Sambandsflokkurin ætlar at lækka skattin. Vit undrast bara á, at Sambandsflokkurin ikki vil út við teirra framrokningum, tí eingin grund eigur at vera til, at alt skal vera so hemmiligt, vísir Anfinn Kallsberg á.

Sambandsflokkurin lovar í valskránni, at marginal skatturin skal lækka frá verandi 56% til 40%. Flokkurin hevur kortini einki boð upp á, hvussu nógv føroyska samfelagið skal rinda fyri henda skattalætta.

Spurdur, um uppskotið hjá Sambandsflokkinum er realistiskt, svarar Anfinn Kallsberg, at hann royndi á einum valfundi mikukvøldi á Fossanesi at fáa umboðið hjá Sambandsflokkinum at greiða frá, hvussu nógv skattalættin fór at kosta, men umboðið hjá Sambandsflokkinum hevði einki svar.

Anfinn væntar sjálvur, at skal marginal skatturin lækka heilt niður á 40%, verður talan um eina upphædd fyri fleiri 100 tals mio. krónur. Løgmaður heldur at spurningurin um at fíggja ein skattalætta snýr seg sum øðrvísi raðfestingar í føroyska samfelagnum. Hann sigur seg vænta, at verður marginal skatturin lækkaður, verður viljin hjá fólki at arbeiða nógv størri og meir er eftir í almennu kassunum.